## UTTAN ÚR HEIMI

# Hervaldið skal leita eftir snigskjúttanum

**Løgreglan í Washington fær nú hjálp frá herinum og flogvápninum at leita eftir snigskjúttanum, sum hevur myrt níggju fólk seinastu fjúrtan dagarnar**

USA
*Árni Joensen*

Amerikanska verjumálaráðið Pentagon boðaði í gjár frá, at tað hevði gjørt av at lata kanningarflogfør hjá flogvápninum flúgva á leiðini yvir Washington, har ein snigskjútti hevur skotið níggju fólk síðani 2. oktober.

Sambært einari lóg frá 1878 kann amerikanska hermegin ikki taka lut í arbeiðinum hjá løgregluni, men sambært Pentagon kann hervaldið nýta ymsa útgerð til at hjálpa løgregluni. Tí hevur Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri gjørt av, at í fyrsta umfari skulu flogfør hjá flogvápninum hjálpa løgregluni at finna drápsmannin.

Úr Washington verður sagt, at Pentagon vildi ikki upplýsa, hvat slag av kanningarflogfari, talan er um, tí løgreglan hevur illgruna um, at drápsmaðurin kann vera ein fyrrverandi hermaður, og at hann tí kann hava ávísan kunnleika til útgerðina umborð á kanningarflogførunum.



*Ein løgreglumaður vísir fólki myndir av hvítum vøruvognum. Fleiri siga seg hava sæð ein hvítan vøruvogn tætt við tey ymsu drápsstøðini*
*Mynd: Reuters*

Seinastu dagarnar hevur løgreglan í Washington fingið fleiri fráboðanir frá fólki, sum siga seg hava sæð ein hvítan vøruvogn tætt við tey ymsu drápsstøðini, men hóast umfatandi kanningar er drápsmaðurin ikki funnin enn.

Fólk í Washington eru ræðslusligin, og nógv tora illa út fyri dyr. Ein dani, sum býr í býnum, segði við danska sjónvarpið fyrrakvøldið, at síðani tann 11. september í fjør hava amerikanarar havt ein felags fígginda, men morðini í Washington hava broytt myndina. Í dag veit eingin, hvør fíggindin er.

- Eingin tosar um al-Qaeda ella Irak longur. Øll tosa um tann ókenda snigskjúttan, segði maðurin við sjónvarpið.

# Ísland aftur limur í IWC - av einum mistaki

**Eitt svenskt mistak gjørdi, at Ísland aftur hevur fingið limaskap í Altjóða Hvalaveiðinevndini**

IWC
*Árni Joensen*

Fyri fyrstu ferð í tíggju ár hevur Ísland fingið limaskap í Altjóða Hvalaveiðinevndini IWC. Tað hendi á fundinum hjá nevndini í London, tá limalondini atkvøddu um íslendsku umsóknina. 19 lond atkvøddu fyri at taka Ísland uppí, meðan 18 lond atkvøddu ímóti.

Svenska stjórnin noyddist at viðganga, at tað var eitt mistak, at Ísland var sloppið upp í IWC. Svenska umboðið hevði fingið boð um at atkvøða ímóti íslendskum limaskapi, men av einari ella aðrari grund atkvøddi umboðið fyri uppskotinum.

- Hetta er sera harmiligt, tí hetta samsvarar ikki við almenna svenska politikkin, segði skrivarin á svenska umhvørvismálaráðnum, Birgitta Bodstrøm, í gjár. Hon legði afturat, at stjórnin fer at kanna, um tað ber til at rætta mistakið.

Ísland fór burtur úr IWC í 1992 fyri at mótmæla avgerðini hjá nevndini at banna vinnuligari hvalaveiði. Síðani hevur landið fleiri ferðir roynt at fáa limaskapin aftur, men til fánýtis. Nú eydnaðist tað so.

Íslendska stjórnin hevur boðað frá, at hon fer at taka ta vinnuligu hvalaveiðina uppaftur í 2006, og at veiðan verður undir strongum eftirliti.

Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace hevur mótmælt íslendsku avgerðini.

# Saddam fekk sjey ár afturat

**Sum væntað fekk irakski forsetin allar atkvøðurnar á forsetavalinum týsdagin.**

IRAK
*Árni Joensen*

Irakski forsetin, Saddam Hussein, verður sitandi í forsetaembætinum sjey ár afturat, verður hann ikki feldur. Higartil hevur hann havt valdið í Irak í 23 ár.

Á valinum fyrradagin eydnaðist tað honum at fáa 100 prosent ella allar atkvøðurnar, men veljararnir høvdu heldur einki í at velja, tí Saddam Hussein var einasta valevnið.

Á valinum fyri sjey árum síðani fekk Saddam 99,96 prosent, men orsakað av amerikansku hóttanini um kríggj varð roknað við, at hann hesaferð fór at røkka teimum 100 prosentunum. Og so varð.

Umleið 12 milliónir irakar fingu møguleikan at atkvøða ja ella nei fyri Saddam Hussein.

*Framhald av síðu 11*

hon undirvíst á kvøldskúla.

Sanna Rasmussen, sum er úr Vestmanna, er í ferð við tað fjórða lestrarskeiðið á listaskúlanum í Randers og verður liðug um tvey ár. Hon hevur havt fleiri framsýningar ymsastaðni í Danmark, og um nakrar fáar vikur skal hon hava framsýning í Randers, har hon býr. Fleiri aðrar framsýningar standa eisini á skránni næstu mánaðarnar. Umframt málningalist fæst Sanna eisini við glaslist.

Triðja listakvinnan, sum er við á framsýningini, er Lív Eidesgaard, sum er ættað úr Oyndarfirði. Í sínum dagliga yrki er hon hárfríðkanarkvinna, men hevur fingist við at mála seinastu seks árini. Lív hevur verið eitt ár á listaskúla í Esbjerg, men hon ætlar sær ikki at skifta saksin út við pensilin. Listin er og verður eitt ítriv, sigur hon.

Framsýningin hjá teimum trimum endar um vikuskiftið.



*Ein málningur av røstum greipum man ivaleyst vekja heimligar tankar hjá Gerdu Astrid*

**ítróttur**

Nr. 199 • hósdagur • 17. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## EB/Streymur upp í 3. deild

Meðan bíðað verður eftir, hvussu tað spælir av hjá 1. deildarliðnum hjá EB/Streymi og 2. deildarliðnum hjá B71, hvat av teimum skal spæla í 1. deild næsta ár, hava tey í Sundalagnum longu nakað at fegnast um.

Teirra 4. deildarlið er flutt upp í 3. deild, og tað hendi við uppflytingardystum móti júst B71!

Tann fyrra dystin vann EB/-Streymur á Eiði 3-1, og seinni dysturin á Sandi endaði 4-2, so næstbestu sundalagsmenninir fluttu upp í 3. deild við samanløgdum 7-3 sigri.

**hj.**

# Nýggj sponsoravtala undirskrivað

**Atlantic Airways og Fótbóltssambandið undirskrivaðu týsdagin nýggja avtalu, og er føroyska flogfelagið sostatt høvuðsstuðul hjá landsliðnum, ið hvussu er hesa undankappingina afturat**

SPONSORAVTALA
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Tá tíðindafundurin hjá føroyska landsliðnum varð settur í Celle, beint uttan fyri sjálvan býin Hannnover, var tað fótbóltsbossurin, Dánjal Andreasen, sum legði fyri við prátinum. Orsøkin til hetta var, at hann vildi boða frá, at FSF og Atlantic Airways høvdu gjørt av at leingja stuðulsavtaluna, soleiðis at flogfelagið framhaldandi er høvuðssuðul hjá landsliðnum.



*Magni Arge og Dánjal Andreasen skrivaðu týsdagin undir avtalu, soleiðis at høvuðsstuðulin hjá fótbóltslandsliðnum framhaldandi er Atlantic Airways*

– Hetta var ein dýr undirskrift, tók Magni Arge til, tá hann skrivaði undir sáttmálan, men hann vildi tó einki siga um, hvussu dýr hon var, og hvønn av pørtunum hon var dýr fyri, men báðir partar tóktust tó nøgdir um hetta.

Víðari segði Magni Arge, at hann fegnaðist um, at Atlantic á hendan hátt kann vera við til at stuðla fótbóltslandsliðnum. Nakað sum flogfelagið annars hevur gjørt í sjey ár, og sum teir soleiðis framhaldandi gera til endan av hesi undankappingini.

– Tað er eingin ivi um, at fótbóltslandsliðið er so nógv tann størsti eksponenturin fyri Føroyar. Lutakastið hesa ferð hevur eisini givið okkum møguleika at koma inn á størsta ferðavinnumarknaðin í Europa, og vónandi kann hetta gerast eitt gjøgnumbrot hjá føroysku ferðavinnuni, segði høvuðsstuðulin, áðrenn hann aftur lat tíðindafólkini sleppa at spyrja Henrik Larsen um, hvussu hansara vónir vóru til dystin móti Týsklandi.

# Ein einastandandi møguleiki

**Magni Arge metir, at lutakastið og góðu úrslitini hjá føroyska fótbóltslandsliðnum hava givið ferðavinnuni ein einastandandi møguleika, sum kanska kann enda við einum gjøgnumbroti á týska ferðavinnumarknaðinum**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Tað hevur verið sagt fleiri ferðir, at lutakastið hjá føroyska landsliðnum, nú teir komu í bólki saman við Týsklandi, var eitt hitt størsta, sum kundi henda fyri Føroyar. Ikki bara føroyskan fótbólt men eisini fyri eitt nú ferðavinnuna, sum við hesum hevur fingið ein einastandandi møguleika at markerað seg í útlendskum miðlum.

### Megna ikki einsamøll

Tí var tað kanska ikki óvæntað, at ein av áskoðarunum á hesi ferðini, var stjórin í Atlantic Airways, Magni Arge, og hann var eisini til staðar undir venjingunum hjá landsliðnum mánamorgunin.

Lítið vistu tykkara útsendu tá um, at Magni dagin eftir skuldi undirskriva nýggja sponsoravtalu við FSF, men vit settu honum tó spurningin, hvønn týdning hann metti lutakastið hava fyri ferðavinnuna.

– Tað er einki at ivast í, at hetta kann koma at fáa heilt stóran týdning fyri ferðavinnuna. Týskland er jú ein risastórur marknaður - ja, kanska tann størsti í Europa, og tað hevur so ongan tíð eydnast okkum at bitið okkum fastan á hendan marknaðin.

– Vit hava ígjøgnum fleiri ár havt gott samband við týskar túr-operatørar, men hetta er ikki nóg. Teir hava eisini biðið okkum um at gjørt eitt rættiligt átak her í Týsklandi, so fólkini fáa eyguni upp fyri Føroyum. Fyrsta treytin, fyri at fólk skulu ferðast til eitt land, er jú, at tey skulu vita, hvat og hvar landið er, og hetta hevur verið trupult.

### Fleiri heppin samanføll

Men tað er ikki bara sjálvt lutakastið, sum hevur opnað dyrnar á týska marknaðinum, heldur Magni Arge. Tað eru fleiri lutir enn tann eini, sum samanlagt geva eitt gott úrslit.

– Sjálvandi var tað gott, at Týskland kom í okkara bólk, men tað hevði í so máta eisini stóran týdning, at vit fingu Skotland, sum jú hevur týskan venjara, í okkara bólk.

– Tá Føroyar og Skotland spældu, var eitt nú ein heil opna í Bild, sum partvíst viðgjørdi dystin á Svangaskarði, meðan hin parturin var ein sera positiv grein um Føroyar. At fáa slíka reklamu í einum av størstu bløðunum í Europa er heilt einastandandi, og eg trúgvi neyvan, at lýsingarvirðið av hesum kundi verið gjørt upp í pengum.

– Og so eru tað sjálvandi eisini úrslitini. Vit hava longu merkt, at góða avrikið móti Skotlandi, sum veruliga vakti ans í bæði Skotlandi og Týsklandi, hevur havt eina positiva effekt á søluna hjá okkum. Áhugin fyri dystinum mikukvøldið er eisini fleirfaldaður eftir skotlandsdystin, og tí er tað eisini avgerandi, at úrslitini eru góð.

– Tú kanst siga tað so, at lutakastið hevur givið okkum ein einastandandi møguleika, og eru úrslitini góð, verður hesin møguleikin fleirfaldaður, og eg vóni, at hetta samanlagt kann gerast atvoldin til eitt veruligt føroyskt gjøgnumbrot á týska ferðavinnumarknaðinum, sigur Magni Arge at enda.



*Stjórin hjá Atlantic Airways er partur av føroyska ferðalagnum í Hannover, og mánadagin var hann í Celle, tá føroyska liðið hevði fyrstu venjingarnar í Týsklandi*